# Eitt hugnaligt valstað í Saksun

**Ein valdagur er nakað fyri seg í Saksun. Tú fert ikki bert á val og so avstað aftur. Nei, formaðurin í valstýrinum bjóðar kaffi og nýbakaðar føstulávintsbollar afturvið!**

FÓLKATINGSVAL '05

*Snorri Brend*

*snorri@sosialurin.fo*



*Alt er gjørt klárt til valið í Saksun. Atkvøðukassin er á borðinum og valstýrið til reiðar. Saman við lítla Lars Gunnar, sum er føddur í desember í fjør, síggjast mamman Anvør og omman og forkvinnan í valstýrinum, Målfryd Dahl-Olsen*

Mynd: Jens Kr. Vang

Tað er helst ikki vanligt á nøkrum staði, at fólk fara til eitt politiskt val inni í stovuni hjá fólki. Men í hesum føri er Saksun eitt undantak.

Valstaðið í Saksun hevur við fleiri av undanfarnum valum verið heima hjá sjálvum bygdarráðsformanninum, Lars Gunnar Dahl-Olsen. Orsøkin til hetta er hin einfalda, at skúli ikki er í bygdini.

Í høvuðsheitum átti ikki at borið til at farið á val hjá bygdaráðsformanninum longur, tí kommunan nú er samanløgd í ta stóru Sunda kommunu.

Men hóast hetta so er valstaðið kortini í heiminum hjá Lars Gunnari, "Á Fløtu" tey kalla, har alt er gjørt til reiðar til at taka ímóti veljarunum.

Ikki tí, talið av veljarum er ikki tað stóra. Í Saksun eru einans 25 veljarar, og har fara so at siga øll á val eftir loknan arbeiðsdag. Tey, sum eru í bygdini, bíða eisini til tá, - bíða eftir teimum sum hava bil, fyri at fáa flutning á valstaðið.

### Blómur og borð

Inni í hugnaligu stovuni hjá Lars Gunnari og konuni Målfryd er alt gjørt til reiðar til hetta valið.

Alt tað formella við vallistum, valevnum og tílíkum er í lagi, tá valhølið - ella valstovan! - lat upp kl. 9 á morgni.

Stovan líkist vanligum stovum í túsundtals øðrum føroyskum heimum. Har eru borð, møblar, myndir, sjónvarp, hyllar við bókum, blómur og annað, sum er við til at gera hesa stovuna so hugnaliga.

Tað einasta sum veruliga brýtur frá er eitt lítið borð, sum "i dagens anledning" er sett innar í stovuna. Tað er á hesum borðinum at krossarnir skulu setast fyri valevnini á tí langa listanum.

Hetta er sjálvt valbúrið. Og tá ein hevur gjørt sína borgarligu skyldu verður farið uttar í køkin, har tann svarti atkvøðukassin stendur á einum stóli. Atkvøðuseðilin verður lagdur í her, og so er tað gjørt.

### Nýbakstur

Eftir at atkvøðan er koyrd í kassan skuldi ein trúð, at valið var liðugt hjá fólki. Men nei, - soleiðis gera tey ikki í Saksun. Tí ein valdagur er hóast alt ikki ein vanligur gerandisdagur, men er og verður ein serstakur dagur.

Målfryd, sum er forkvinna í valstýrinum, plagar at gera ein góðan drekkamunn við nýbakaðari kaku aftur við. Soleiðis kunnu fólk seta seg niður at hvíla seg eina løtu og fyri at fáa eitt lítið prát eftir atkvøðugreiðsluna.

Og fólkatingsvalið 2005 var einki undantak í so máta.

– Jú, eg fari eisini at bjóða fólki ein drekkamunn hesaferð. Og eg ætli mær at bjóða teimum heimabakaðar føstulávintsbollar afturvið, sigur Målfryd.

Hon er sum nevnd forkvinna í valstýrinum. Har sita eisini dóttir hennara, Anvør Dahl-Olsen og Gurli Svartá.

### Tríggir flokkar

Vit vitjaðu valstaðið í Saksun um 10-tíðina fyrrapartin í gjár, men tá hevði eingin verið á vali.

Við fólkatingsvalið í 2001 vóru 21 av teimum 25 fólkunum á vali. Henda atkvøðugreiðslan vísti, at bygdin er í trimum, tí talan er um politiskar flokkar.

Við valið tá fingu Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hvør sínar seks atkvøður, meðan Tjóðveldisflokkurin fekk níggju.

Hvussu verður hesaferð er ilt at meta um. Tað fæst at vita um kvøldið - kanska tíðliga á kvøldi, tí atkvøðutalið ikki er so stórt!

# Jøkulfelli sokkið

**Mánakvøldið sendi skipið út neyðarkall. Brimil og Tyrlan komu skjótt á staðið, men enn eru seks av manningini ikki funnir**

*Jákup Mørk*



*Jøkulfell var heimahoyrandi í Estlandi og skrásett á Isle of Man. Skipið hevur verið í sigling fyri Samskip í eitt ár og hevur roynst væl. MS Jøkulfell er smíðað í Danmark í 1989. Tað er 3.200 tons frystiskip eins og tað eisini flytir vanligan farm*

Jøkufelli var á veg úr Liepaja í Letlandi til Reyðafirðar við 2.000 tonsum av stáli, tá tað um átta tíðina á kvøldi sendi út neyðarkall. Skipið var tá statt um 55 fjórðingar í ein landnyrðing úr Fugloynni.

Tyrlan, Brimil, Tjaldrið, og Vædderen sigldu øll beint á positiónina, haðani neyðarkallið var sent, umframt at ein russiskur trolari eisini kom á staðið.

Kl. 22.20 kom tyrlan á staðið, men tað var greitt, at skipið stóð ikki at bjarga. Tað var um hetta mundi koppað á liðina.

Manningin á skipinum taldi 11 mans, og fimm teirra vórðu funnir nærhendis skipinum. Allir vóru teir í bjargingarbúna, og tað eydnaðist at fáa allar upp í tyrluna, sum síðani flutti teir umborð Vædderen.

Tað eydnaðist ikki at finna fleiri av manningini á lívi týsnáttina, men enn stendur leitingin við.

Av sjóbjargingarstøðini verður sagt, at Tjaldrið, Brimul og Vædderen framvegis eru við í leitingini, eins og russiski Viktor Mironov er tað. Hartil er Line Breezer, ið er ein norskur línubátur, eisini komin á staðið.

Eisini verður leitað við flogfari, sum íslendska sjóverjan hevur sent á staðið, og fyrrapartin týsdagin varð føroyska sjóverjutyrlan aftur send avstað. Tá vit um 11'tíðina høvdu orðið á Djóna Weihe á MRCC støðini, vóru tó framvegis eingi tekin sædd frá hinum seks av manningini.

### Gingið skjótt

Djóni Weihe sigur annars, at tað eftir øllum at døma hevur gingið ógvuliga skjótt fyri seg, tá Jøkulfelli sakk.

– Enn hava vit ikki fingið staðfest, hvussu hetta gekk fyri seg. Men sum vit hava skilt, so hendi alt innan ógvuliga stutta tíð. Allar helst er skipið farið á liðini eftir heilt fáum minuttum, og tí hevur manningin stórt sæð ikki havt stundir at gera nakað sum helst, sigur Djóni Weihe.

– Neyðarkallið var ikki stórt meira enn eitt navn og ein position, og tí sendu vit alt fyri eitt skip á staðið. Danska sjóverjutyrlan varð eisini send alt fyri eitt, so vit kundu staðfesta, hvat í veruleikanum var hent.

Annars sigur Djóni, at veðrið á ongan hátt er í parti við leitingini. Tá vit tosaðu við MRCC-støðina, var talan um einar 15 metrar um sekundi á staðnum, og hartil var sjógvurin ringur. Og væntandi fór veðrið at gerast munandi verri, sum dagurin leið.

## Umboðsmaðurin vísir kærum um Listasavnið frá sær

**Umboðsmaðurin hevur fingið fleiri klagur um starvssetanina av leiðara fyri Listasavn Føroya, men hann kann einki gera við hesi mál**

KLAGUR

*Eyðun Klakstein*

Løgtingsins Umboðsmaður kann einki gera við stríðið, sum hevur verið í sambandi við starvssetanina av leiðara fyri Listasavn Føroya.

Hóast Umboðsmaðurin hevur fingið fleiri klagur um hetta, fer hann ikki at kann málið.

Sambært § 4 í umboðsmanslógini fevnir virksemið hjá umboðsmanninum um alla fyrisitingina hjá heimastýrinum og feløg, stovnar og annað, sum verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini.

– Listasavn Føroya er ein sjálvsognarstovnur. Sambært viðtøkunum er ávirkanin hjá landsstýrismanninum, umframt at velja formannin í stýrinum, avmarkað til, hvat skal henda í sambandi við eina møguliga avtøku av stovninum. Umboðsmaðurin heldur tí ikki, at Listasavnið kann roknast at vera ein partur av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, sigur Løgtingsins Umboðsmaður í sínari niðurstøðu.

### Røkkur ikki til Listasavnið

– Sambært § 1, stk. 3 í fyrisitingarlógini kann landsstýrið áseta, at lógin eisini heilt ella fyri ein part skal verða galdandi fyri nærri ásett feløg og stovnar v.m. Tað er tó einki, sum bendir á, at landsstýrið hevur tikið avgerð um, at Listasavnið skal vera fevnt av fyrisitingarlógini.

– Grundað á hetta heldur umboðsmaðurin ongan iva vera um, at Listasavn Føroya er ein sjálvsognarstovnur, sum ikki er fevndur av fyrisitingarlógini og harvið heldur ikki av virksemi og heimildarøki hansara.

Umboðsmaðurin avvísir tí klagunum um Listasavn Føroya.